# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Kári Láadal 65 ár

Hósdagin 27. oktober fyllir Kári Láadal í Havn 65 ár.



Kári er ættaður úr Hvalvík. Foreldrini vóru Thomasia og Johannes Johansen, tey fingu sær seinni eftirnavnið Láadal. Kári er nummar 3 í røðini av 9 systkjum, harav 5 eru búsitandi í Danmark. Abbabørnini eru fýra, Ann Tóra, Bárður, Kári og Niels.

Ein stuttlig søga um Kára er, at tá ið hann var 14 ára gamal, litil og spinkul, gekk ein skipari runt í bygdini har norðuri og bað fólk. Kári sigst at hava svarað honum: Um eg ikki sleppi við nøkrum øðrum. so komi eg við tær. Og tað vildi soleiðis til, at hann fekk kjans við Sjóløvuni og seinni við Fame og øðrum skipum. Hann var eisini eitt skifti í Íslandi og arbeiddi.

Í 1960 fór Kári á skiparaskúla. Eftir lokna skúlagongd fór hann fyrst bæði við føroyskum og norskum línubátum, áðrenn hann í 1970 fór út at sigla við skipum hjá Boserup og Bewa Line og sigldi hann úti til 1978.

Kári og Bergtóra bygdu sær hús í Hvalvík í 1966. Har búð tey, til tey í 1986 fluttu til Havnar.

Síðani Kári gavst at sigla, hevur hann havt fleiri álitisstørv, m.a. í Málingahandlinum, hjá P/F Frants Restorff, og hann hevur eisini verið bussførari. Í kreppuárunum mitt í nítiárunum fór Kári til Danmarkar at leita sær arbeiði, og hann var bussførari í Esbjerg í 8 ár. Í fjør flutti Kári heimaftur og fríggjakvøldið tann 28. oktober heldur hann 65 ára føðingardagin heima á Mýrusnípuvegi 7 í Havn.

Vit eru mong, ið ynskja Kára hjartaliga tillukku við føðingardegnum og alt tað besta í framtíðini.

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Jacob Johansen**, fyrrverandi gravari í Klaksvík, andaðist týsdagin á Norðoya røktarheimi, 89 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum heim í kirkjuna hóskvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr kirkjuni fríggjadagin klokkan 13.30. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Hans Jacob, kunnu ístaðin fyri blómur og kransar lata eina gávu til Norðoya røktarheim, konta Norðoya Sparikassa.

Kistan við **Andreas Richardt**, vanliga nevndur Diaba, í Sumba, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi mikukvøldið kl. 18.

Jarðarferðin verður úr Sumbiar kirkju hósdagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

Galerie Focus:

## Kári Svensson og Joseph Salamon í Focus



*Kári Svensson, listamaður, fer at hava framsýning saman við Joseph Salamon, myndahøggara og grafikara í Galerie Focus*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 28. oktober kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Kára Svensson og Joseph Salamon upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Við á framsýningini eru málningar og litografiir hjá Kára Svensson og skulpturar hjá Joseph Salamon.

Framsýningin verður opin til 10. november, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.



*Joseph Salamon er myndhøggari og grafikkari*

Joseph Salamon og Kári Svensson vera tilstaðar á ferniseringini fríggjadagin 28. oktober.

Joseph Salamon er myndhøggari og grafikkari, føddur í 1932 í Transsylvanien. Búsitandi í Danmark síðan 1960. Hann arbeiðir við skulpturinum í so gott sum øllum tilfari frá træ, marmor og granit til jarn og bronsu, eisini vatn, tá hann skapar gosbrunnar.

Ofta eru skulpturarnir skaptir í sambandi við nýggjan arkitektur. Saman við konu síni, Hanne Salamon, hevur hann vunnið fleiri kappingar um rúmprýði ymsastaðni í Danmark.

Kári Svensson er málari og grafikari, føddur 1954 í Havn. Teir eldru av málningunum hjá Kára eru mangan kubistiskt statiskir, meðan tað er meira rørsla í teimum seinnu myndunum. Í teimum eldru myndunum var tað klassiska føroyska motivið, bygdin við sjóarmálan, avmyndað úr ekspressivari kubismu til lyriska abstraktión, har tú bara hórar bygdina, tí tú veitst, at hon er har.

### Dagurin

**27. oktober. Sem**. Hann var elsti sonur Nóa og var ættarfaðir at semitisku fólkasløgunum. Navnið er hebráiskt og merkir *sonur* ella *arvingi*.

Føroya Sparikassi:

## Steinbjørn settur sum Human Resources-mennari



Frá 1. november er Steinbjørn Hardlei settur í starv sum HR-mennari á starvsfólkadeild Sparikassans.

Fokus kemur á hitt nýskapandi og kreativa arbeiðsumhvørvi í Sparikassanum, nú ein Human Resources-mennari verður settur í starv í fyritøkuni.

Steinbjørn Hardlei er ein gamal kenningur í Sparikassanum, har hann áður hevur verið starvsfólkaleiðari.

Seinastu tvey árini hevur Steinbjørn lisið kandidatlesna í virkisbúskapi, cand.oecon., sum fjarlesandi við Århus Universitet. Samstundis hevur hann rikið ráðgevingarfyritøkuna Hugin spf., ið m.a. hevur fingist við at hjálpa føroyskum fyritøkum og stovnum á HR-økinum.

